Or›alisti

Or› i› ver›a n‡tt í K.T.Horninum

Alnet	Internet
Datagrunnur	Database
Fílaflutningur/filaveiting	Filoverførsel
Forrit	Program
Geril	Processor
Heimsta›ur/heimaøki	Domæne
Ímynd	Ikon
Kervi	Netværk
Kjaksí›ur	Diskussionsgrupper
Leitibúna›ur	Browser
Leitimaskina/Netleitari	Søgemaskine
Móthald	Modem
Ravtøkni	Elektronikkur
Ritbúna›ur	Software
Rógva út	Surfe
Samvirki	Interactivt
Talgildismyndatóli	Digitalt kamera
Teldupreint forriti	Desktop Publishing
Tí›indasí›ur	Nyhedsgrupper
Tólbúna›ur	Hardware

Topp — 10 listin

Mest vitja›u føroysku heimasí›urnar frá www.leitel.fo

Hesa vikuna	Seinastu viku	Vikur á listanum	Sí›unavn
1	1	7	#Faroese_Chat
2	3	13	Tí›indabla›i› Sosialurin
3		0	He›in Mortensen
4	2	13	Dimmalætting
5		0	Jógvan Heinesen
6	8	6	NSÍ
7	6	1	Føroya Javna›arflokkur
8	7	6	Leitel Tí›indi
9	10	1	Leitel Chat
10		0	Havnar Bóltfelag

Kelda: www.leitel.fo

Smáti›indi:

Yahoo! Ein gó›ur roknskapur

Ein av heimsins størstu leitimaskinum, amerikanska Yahoo.com, innloysti vánirnar til gó›sku úrslíti› fult og heilt, og prógva›i einafer› med alla, at ta› kann lata seg gera, at vinna pening sum eitt dotcom virki. Fyrsta ársfjór›ing í ár umsetti fyritøkan fyri 480 milliónir krónur.

Yahoo! hevur 625 milliónir vitjandi dagligt, og 125 milliónir av brúkarum kring allan knøttin. Hetta ger yahoo! til eina av heimsins størstu fyritøku á sínum øki.

Sambært Reuters n‡ta heili 70 prosent av amerikumonnum, vi› alnet íbinding, Yahoo! innanfyri ein mána›a. Sum skilst, eru ta› serliga finanssí›urnar, i› eru sera populerar hjá fólki innan peningamarkna›in.

Káta Horni›

Vit hava aftur hesufer› valt at tiki› nøkur skilagó› or› frá eini svunnari tí›.

Í framtí›ini skulu teldurnar ikki viga› meira enn 1,5 tons.
Popular Mechanics, mars 1949

Eg havi fer›ast landi› tunt, og hitt øll tey kendastu fólkini, og eg kann vissa tykkum um, at tekstvi›ger› er eitt mistak, i› er gloymt á›renn ári› er av.
Ábyrgdarbla›stjórin fyri búskaparligt tilfar hjá forlagnum Prentice Hall, 1957

Men hvat er hatta mikrochipsi› so gott fyri?
Verkfrø›ingur hjá IBM, 1968

Eg dugi ikki at síggja nakra orsøk til, at nakar ynskir at hava eina teldu heima vi› hús.
Ken Olson, forseti hja Digital Equipment Corp., 1977

Tema: Teldukeyp:

2. partur – Hvat kunnu vit brúka telduna til?

Í seinasta bla›i umrøddu vit nøkur forrit, sum vit í okkara gerandisdegi kunnu brúka telduna til. Talan var um teksvi›ger›, rokniark, datagrunnar, myndavi›ger›, forriting og prenttilger›. Vit halda fram í hesum bla›num at vi›gera undirhald, undirvísing, Internet og multimedia.

Undirvísing og undirhald

Ein telda kann vera gó› til undirvísing. Teldurnar í dag eru so lættar at brúka, at sjálvt smábørn hava als ongar trupulleikar at brúka tær.

Børn kunnu á telduna spæla og samstundis læra at rokna, lesa og skriva. Tíanverri finnast ta› sera fá forrit (um naka›) á føroyskum, men nøkur eru á donskum og markna›urin er í stórari menning.

Børnini hava eisini møguleika at royna teirra kreativu evni vi› tekniforritum á telduni. Tey kunnu tekna og mála, gera teknifilmar vi› livandi myndum, tónleiki og øllum møguligum ljó›um.

Eisini tey vaksnu kunnu royna síni kreativu evnir á telduni. Umframt at tekna og mála kann knappabor›i (tastaturi›) brúkast sum ljómbor›stangentar og at komponera tónleik vi›. Eisini er møguleiki at taka upp livandi myndir eitt nú úr sjónvarpinum og at arbei›a vi›ari vi›, til dømis at leggja tekst og a›rar effektir á myndirnar fyri sí›an at goyma myndirnar aftur á videobandinum.

Undirvísing til vaksin er heldur ikki heilt ókend í telduver›ini. Hevur man eitt móthald (modem) kann man fáa samband vi› fjarundirvísing og fáa uppgávur frá læraranum og senda loysnir aftur til hansara. Umframt ta› kann man eisini keypa undirvísingarfløgur vi› nógvum ymiskum evnum. Ein undirvísingarfløga inniheldur ofta livandi myndir og ljó›, har ein lærari grei›ir frá.

Sjálvandi finnast ein ørgrynna av spølum til bæ›i børn og vaksin, og ta› er ikki bert talan um har›lig aktionspøl. Nógv av spølunum seta stór krøv til tín hugaheim og evnini at loysa truplar uppgávur. Ta› er ymiskt frá spæli til spæl, hvussu stór krøv tey seta til spælaran, og ta› finnist altí› eitt spæl til ein hvønn aldur og áhuga. Tey mest vanligu spølini eru: Aktionspøl, Strategispøl, Ævint‡rspøl og Simulatorspøl.

Til seinast kunnu vit nevna ein bólk, sum hvørki er spøl ella undirvísing. Ta› er til dømis leksikon, landakort (Atlas), Feriufyrireiking og fløgur vi› ávísum evnum (dinosaurar, havi›, astrologi og so framvegis)

Internet (World Wide Web)

At fáa atgongd til heimsumfevnandi Interneti› krevur bæ›i naka› av tólbúna›i (HW) og ritbúna›i (SW), eina telefonlinju og eitt internethald hjá Olivant.

Av tólbúna›i krevst ein gó›ur geril (processor), í minsta lagi ein Pentium, umframt eitt móthald sum helst er 33.600 BAUD ella K56 vi› 56.000 BAUD, ella eitt ISDN móthald. Sjálvt um man velur eitt sindur d‡rari móthald, eru pengarnir skjótt spardir vi› ta› at internetrokningin ver›ur ta› minni.

Tann ritbúna› sum skal til fær man frá Olivant, har man keypur sítt Internethald. Vi› tí avtaluni betalir man eitt fast mána›argjald, sum í løtuni er kr. 70,00. Harafturat kemur so Internettaksturin sum er fyri hvørt minut tú brúkar Interneti›. Í løtuni er hesin takstur 30 oyru fyri minuttin um dagin frá 08:00 til 18:00 og 15 oyru um minuttin um kvøldi og sunnudagar. Eisini skal man gjalda uppringingargjald uppá 40 oyru fyri hvørjafer› man fær samband vi› Olivant. Allir prísir eru vi› mvg.

Tá tú bíleggur Internetsamband frá Olivant, skal tú uppgeva hvussu tú kundi hugsa tær at tín teldupostadressa ver›ur. Teldupostadressan hevur hetta skap xxxx@yy.fo, har X'ini standa fyri ta› tú sjálvur velur tíl dømis Hans. Sí›an kemur @ sum á føroyskum ver›ur kalla› trant "A" og merkir hjá. Aftan á @ kemur so post.olivant.fo, sum merkir at har liggur tín postkassi. Solei›is kann tín endaliga teldupostadressa blíva Hans@post.olivant.fo, um hon nú ikki er upptikin. Føroyskir stavir sum í, ó og › kunnu ikki brúkast í einari teldupostadressu.

> Minst til: At tá tú er á Internetinum, er telefonlinjan vanliga upptikin, solei›is at onnur ikki kunnu ringja til ella frá telefonnummarinum. Men vi› einum ISDN sambandi fær tú eina linju fyri seg bert til Interneti›. Ta› ber eisini til at fáa samband um eina felagsantennu. Hetta er í flestu forum bíligari enn vanligt Internetsamband og tú upptekur ikki teleofonlinjuna me›an tú er á Internetinum.

Um tú bert ætlar at brúka títt Internetsamband til teldupost, eru krøvini ikki so stór til móthald og gerilorkuna, sum tey eru um tú ætlar at "rógva út" (surfa) á Internetinum. Hóast hetta skal tú altí› taka hædd fyri at ta› ver›ur ró› út á Internetinum, og lat ver›a vi› at keypa ov lítla útger›, um tú vil hava fulla nyttu av Internetinum. Ta› er sera einkult at gera sína egnu heimasí›u og tá tú hevur tekna eitt Internethald hevur tú eisini goldi› fyri pláss til tína heimasí›u.

Multimedia

Multimedia er, sum or›i› sigur, ein samanseting av ymiskum mi›lum: Teksur, ljó›, myndir og livandi myndir. Eitt multimediaforrit kann til dømis ver›a eitt leksikon, sum umframt tekst eisini hevur ljó› og livandi myndir.

> Multimediforrit eru í einari sera spennandi menning, sum stillar stór krøv til telduorkuna. Ta› er tí ikki allar teldur, sum eru egna›ar til endamáli›.

Eitt anna› dømi uppá eitt multimediaforrit er eitt spæl, har nógvu ymisku pallarnir eru filmupptøkur vi› vanligum sjónleikarum. Fyrimunurin fram um ein vanligan film er at spæli er samvirki› (interaktivt). Ta› vil siga at ta› er tú sum avger› handlingina. Ta› ber eisini til at keypa vanligar filmar á fløgu (DVD) sum kunnu vísast á telduni.



sid@sosialurin.fo
kelda: www.fs.dk

Viðmerking:

Óynsktir

Blaðið hjá danska javnaðarflokkinum hevði stór tíðindi at bera okkum føroyingum nú um dagarnar

Tríggir av fýra dønum ynskja okkum hagar piparið grør!

Í hesum er einki nýtt. Ein kanning, sum Jútlandsposturin gjørdi fyri tveimum árum síðani, vísti tað sama, og tann sum hevur fylgt við í donskum bløðum hesa øldina, veit at soleiðis hava vanligir danir altíð hildið.

Danska imperialisman ikki fólkaynski

Men higartil hevur hesin hugburður hjá vanliga dananum ikki havt nakra ávirkan á teir danir, sum hava gjørt av, hvør politikkur ið rekast skuldi móti Føroyum. Tí hevur tað eydnast hesum máttmiklu dønum at álagt tí stóra meirilutanum av dønum, sum ikki eru imperialistar, at gjalda skattir, sum hava verið nýttir til at keypa hesum fáu donsku imperialistunum undirtøku í Føroyum.

Felda tilboðið 1906

Hetta var tað sum hendi í 1906. Tá høvdu føroyingar valt ein fólkatingsmann, sum æt Jóannes Patursson. Hann helt, at tað almenna skuldi gera fløgur í undirstøðukervið í Føroyum, so vit fingu havnir, ið kundu geva okkum møguleikar fyri at nýta tað ríka tilfeingið, sum var kring um oyggjar okkara.

Aðra staðni í ríkjasambandi okkara hevði statskassin goldið slíkar havnir, eitt nú í Esbjerg. Men tá Jóannes skeyt upp, at staturin eisini skuldi gera tað sama í Føroyum, fekk hann at vita, at í Vesturjútlandi, har Esbjerg var, guldu íbúgvarnir skatt til statin, og so leingi føroyingar ikki gjørdu tað, kundu teir ikki rokna við at fáa nakra játtan til nakra statshavn.

Tá var tað, at Jóannes skeyt upp, at føroyska løgtingið í staðin kundi fáa heimild at krevja upp eina so stóra upphædd, at hon svaraði til statsskattin aðrastaðni í ríkjasambandinum.

Tá hann so kom heim til Føroya við hesum tilboði, varð hann feldur. Hetta var ikki tí at føroyingar ikki dugdu at síggja, at tað var skilagott at fáa nýmótans havnir gjørdar, men tí at mótstøðumenn hansara søgdu, at teir kundu megna tað hann ikki megnaði, nevnliga at fáa danir at gjalda fyri hesar útbyggingar uttan at vit skuldu gjalda nakran skatt yvirhøvur. Vit skuldu hvørki gjalda skatt til statin ella til løgtingið, og allíkavæl fáa allar teir góðar, sum hoyrdu nútíðini til.

Imperialisman figgjað við donskum skattum

Hetta vallyfti kundu teir halda, tí teir fingu teir imperialistisku danirnar at gjalda við skattunum hjá teimum dønum sum ikki tóku undir við hesum politikki. Tá var tað av álvara farið undir tann politikk, sum til henda dag hevur givið atkvøður til teir føroysku politikarar, sum reisa seg upp og siga: Vit eru menn fyri at fáa danir til at gjalda okkara vallyfti.

Við hesum politikki hevur tað eydnast teimum fáu donsku imperialistunum at varðveita ræðið yvir Føroyum. Viðhvørt hevur sjálvandi verið teimum vátt undir føti. Í 1946 vóru teir fyri tí óhappi, at føroyingar, í staðin fyri at samtykkja at fáa heimastýri, gjørdu av at loysa frá Danmark. Men slíkt tók teir ikki av fótum. Teir søgdu tá, at kundu teirra viðhaldsmenn til løgtingsvalið, sum kom aftaná, fáa vald ein meiriluta, sum ikki vildi seta fólkaatkvøðuna í verk, so skuldu teir fáa meir enn tær tvær milliónirnar, teir tá fingu um árið. Hetta var nóg mikið til at vinna valið, og so kundu teir aftur hóreiggja sær sum fyrr.

Tapið fyri okkum av tí at vit ikki loystu í 1946

Árið eftir, í 1947, spurdi eitt bretskt felag, um tað kundi seta upp eina radiosendistøð í Føroyum. Teir vóru fúsir til at gjalda 15 milliónir um árið fyri eitt slíkt loyvi. Men nú søgdu danir: Tað eru vit, sum hava ræðið, og vit siga nei!

Fíggjarliga tapið fyri okkum av tí at vit lótu okkum tøla av donsku lyftunum var tí ómetaligt, og tað hevur staðið við og versna øll árini síðani.

Nú er so spurningurin, um tað fer at eydnast tí stóra meirilutanum av ikki-imperialistiskum dønum at seta donsku imperialistarnar upp á pláss.

Tað er at vóna, tí eydnast tað, so er tað sera lætt at skipa viðurskiftini millum Danmark og Føroyar.

Ongan blokk – men statsskatt!

Tað einasta, sum skal til, er at teir donsku imperialistanir fáa at vita, at teir sleppa ikki framyvir at fíggja politikk sín við donskum skattainntøkum. Tá fara veitingarnar til Føroyar halda uppat, og føroyingar skulu gjalda sama skatt til statin sum aðrir borgarar um so er, at teir vilja vera saman við Danmark.

Hetta er tað, sum danski javnaðarflokkurin nú hevur spælt út við. Enn hevur hann tó bert sagt, at blokkstuðulin skal halda uppat, men lítið er at ivast í, at statsskatturin stendur næstur á skránni.

Uttarliga skal óboðin sita

Einki bendir á, at nakar meiriluta fæst í Føroyum fyri at vera saman við Danmark undir slíkum treytum. Tí er bert eitt at gera, og tað er at skipa fyri skilsmissuni á ein slíkan hátt, at samstarvið millum ríkini bæði verður so gott sum møguligt.

Hetta er tað, sum nú er farið undir, og er at ynskja, at tað ikki tekur ov langa tíð, tí hvør dagur, ið livað verður saman við fólki, sum ikki ynskja at hava ein inni hjá sær, er ein pína.

Zakarias Wang
11/4 2000

Godt ord igen

Jonhard Eliasen går i Sosialurin den 8. april 2000 stærkt i rette med de private pengeinstitutter, som har gjort indsigelse mod forslaget til ændring af lagtingslov om Landsbanka Føroya. Det er næppe frugtbart her at indlade sig i en polemik med Jonhard Eliasen om lovforslagets indhold. Men det kan nok forekomme, at enkelte af Eliasens anbringender gør krav på en kommentar.

Jonhard Eliasen formaner pengeinstitutternes ledelser til at respektere demokratiet. Jeg vil helst tro, at denne formaning er overflødig! Men er det da i øvrigt ikke netop et kendetegn ved demokratiet, at borgerne har mulighed for at tage del i debatten? Og er det ikke sædvane i et demokrati, at lovforslag, som må antages at være af særlig interesse for en branche eller en interesseorganisation, bliver sendt til høring hos den relevante organisation? Det skete blot ikke denne gang. Helt tilfældigt blev pengeinstitutterne opmærksomme på, at der i lagtinget var fremsat et lovforslag, som kan vise sig at få stor betydning for pengeinstitutternes virksomhed.

Eliasen påpeger meget rigtigt, at de private pengeinstitutter ikke kan have et overordnet ansvar for økonomien. Heri er jeg ganske enig. Men lettere forbavsende er det da, når Eliasen herefter gør gældende, at ansvaret for økonomien bør ligge hos Landsbanken. Ansvaret bør vel ligge hos landets demokratisk valgte forsamlinger - hos lagtinget og hos landsstyret. Ansvaret kan slet ikke ligge hos Landsbanken, som ganske mangler de virkemidler, der kræves, for at kunne føre økonomisk politik - i dette tilfælde pengepolitik.

Jonhard Eliasen sammenligner frejdigt Landsbanki Føroya med klassiske centralbanker. Men Landsbanken er ikke nogen centralbank. En centralbank er karakteriseret ved, at den kan udstede sedler. En forudsætning for at kunne udstede sedler er imidlertid egen valuta. Uden egen valuta kan Landsbanken ikke påvirke valutakursen, Landsbanken kan ikke påvirke pengemængden, eller likviditeten, og Landsbanken kan ikke påvirke renteniveauet. Så længe Færøerne har valutafællesskab med Danmark, giver en færøsk centralbank ikke mere mening end en bornholmsk centralbank. Og hvem ville dog finde på at oprette en centralbank i Rønne?

Landsbanken - i dette tilfælde Jonhard Eliasen - tyr på ny til argumentet om, at blot Landsbanken var blevet til virkelighed i 1978, havde vi ikke fået overophedningen af økonomien i 80'erne og det efterfølgende sammenbrud i 1992-93. Jeg har svært ved at tro, at Landsbanken ville have gjort nogen forskel i 80'erne. Og jeg har svært ved at indse, at de politiske myndigheder i deres virke var hæmmet af, at vi ikke at have en landsbank.

Når forholdene i 80'erne også i den finansielle sektor kom ud af kontrol, så skyldtes det navnlig den særegne færøske rentebeskatning, som førte til, at det færøske renteniveau kom ud af trit med renteniveauet i Danmark. Et forhold, som førte til spekulation, og som førte til, at Færøerne blev oversvømmet af likviditet. Men at ændre rentebeskatningen var vel et anliggende for lagtinget. Og ikke noget, som Landsbanken kunne have taget sig af.

En anden væsentlig årsag til, at den finansielle sektor - og samfundet - i 80'erne kom på afveje, var den lette adgang, som erhvervene havde til at sikre sig landsstyregarantier for lån, der ikke burde have været givet - og som uden landsstyrets garanti næppe heller var blevet givet. Men beslutningen om at lade landsstyret stille garantier blev vel taget af lagtinget. Det var vel ikke en beslutning,

som Landsbanken kunne have omgjort.

Alle kan forstå, at der er behov for at samordne den offentlige likviditet. Men det kræver ikke en landsbank. Indtil det modsatte er sandsynliggjort, er det min opfattelse, at landsstyret og landsstyrets virksomheder med fordel vil kunne vælge at udføre deres bankforretninger gennem de private pengeinstitutter - på Færøerne eller i udlandet - frem for at oprette en særlig bank til opgaven.

Jonhard Eliasen gør i overskriften til sin artikel gældende, at pengeinstitutterne må anerkende Landsbanken som myndighed. Her rører Eliasen ved et andet problem, som pengeinstitutterne har peget på. Jeg tror, alle kan forstå, at pengeinstitutterne føler sig usikre ved, at Landsbanken, som nu ved lov vil have udvidet sine muligheder for at konkurrere med de private pengeinstitutter, også ønsker at påtage sig en tilsynslignende opgave i forhold til pengeinstitutterne. Ingen kan bære kappen på begge skuldre. Heller ikke Landsbanken

Jørn Astrup Hansen

Føroyavinir á føroyskum fundi í Odense

Nógv fólk kring landið kenna nøvnini Curt og Karen Nielsen. Tey vóru trúboðarar í Sandoynni og møguliga aðrastaðni við í fleiri ár innan Hvítusunnusamkomuna. Tey hava framvegis nógv samband við føroyingar á flatlondum og tey vitja eisini heim á klettarnar av og á.

Leygardagin 15. apríl kl. 16 verður evangeliskur fundur við teimum báðum í hølunum hjá Luthersk Missión, Vesterbro 9 B – mitt í Odense.

Málið verður eitt sindur hálvbrotið dansk/føroyskt ella føroyskt/danskt, so tað ber til at skilja bæði hjá hálvum føroyingum og hálvum dønum – (skulu vit so ganga ella plussa? – í hesum tíðum við roknistykkjum um føroyingar í Danmørk).

Vit eru so aftur í teimum hølunum, sum vit byrjaðu í fyri skjótt langari tíð síðani og tey eru har, sum Søndergade kemur út í Vestergade/Vesterbro. Tú skalt inn ígjøgnum eitt (trongt) portur ímillum Pizzaria Italiano og Parykhuset. Tú skalt ikki leggja í, at eitt skilti við orðunum »Óviðkomandi onga atgongd«. Evangeliið er opið fyri øllum, og ætlar tú tær á evangeliskan fund, so ert tú vælkomin. Tú ert eisini vælkomin.

Eftir fundin við hesum fittu gomlu fólkunum ert tú/eru tit vælkomin til ein drekkamunn. Eru ivamál, ber til at ringja til Árna Helmsdal, tlf. 65961373.

Lesið tíðindi
www.sosialurin.fo